Fylgiskjal 32

<u>**Viðmerkingar um løgtingslóg um almannatrygd og vælferð**</u>

Egerterapeutfelagið fegnast um, at uppskotið um omanfyristandandi lóg er tikin upp aftur. Tað er sera gott at síggja viðlíkahaldsvenjing, flutningstænastan og borgarastýrd stuðulstænastan eru tikin við í uppskotinum.

Tó vilja vit gera vart, at lógaruppskot kann gerast enn betur, men nakrar broytingar verða gjørdar.

Í § 29 stk 3. verður hjálparráð ikki veittur persóni, ið býr á ellis- og røktarheimið ella sambýlið ið eru skipað undir heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Víðari í almennu viðmerkinginum stendurat persónur, sum fær bústaðartilboð sambært hesi lóg ( frá Almannaverkinum), frameftir hevur sama rætt til hjálpartól sum persónur, ið býr í egnum búðstaði. Hetta er ein liður í at avtaka stovnsgerðing. Men á ellis- og røktarheim ella eldrasambýlið, ið ein kommuna ella kommunalt samstarv varða av, verður hjálparól mett, sum ein partur av grundútbunaðinum á staðnum.

Ergoterapeutfelagið vil gera vart við, at tá heimatænastan og eldrarøkt var lagt út til kommununar í 2015, fylgdi hjálpartólaøkið ikki við, tí eiga allir borgarar at verða fevndur av málbólkinum í hesari lóggávu viðv. hjálpartólum. Hyggja vit eftir núverandi lóggávu, sum eru allir borgarar, ið búgva á stovni, líka fyri lóguni. Ergoterapeutfelagið hevur áður gjørt vart við, at hettar er at gera mismun á borgarum. Við núverandi uppskotið verður munur gjørdur á um ein er yvir ella undir 67 og býr á stovni.

Hóast tað stendur í almennu viðmerkinginum, at skipanina við hjálpartólum verður eftirmett í næstum, og at støða tá skal takst til, um skipanin á ellis- og røktarheiminum og eldrasambýlinum eisini skal broytast, fer Ergoterapeutfelagið at heita á Almannaráðið at tryggja, at øll, sum eru líka stødd, eru líka fyri lógini, óansæð um tey eru undir ella yvir 67 ár.

§ 37 stk.3 kann hjálparráð veitast í samband við endurvenjing. Í almennu viðmerkinginum stendur, at møguligt er at fáa stuðul til hjálparráð (hjálpartól), meðan persónur fær endurvenjing frá Almannaverkinum, hóast talan ikki er um varandi brek ( her er talan um fyribils hjálpartól).

Hettar merkir at borgarar millum 18-67 ár hava møguleikan at fáa fyribils hjálpartól, meðan teir fáa endurvenjing. Tað er oftast tørvur á fyribils hjálaprtólum í einum endurvejingarskeiði, so hettar er at gleðast um. Men aftur her, má Ergoterapeutfelagið gera vart við, at her verður aftur gjørdur munur á, um borgarin er undir ella yvri 67 ár.

Í almennu viðmerkinginum kap. 1, 1.1 Orsakir til uppskotið stendur m.a.

> "Endamálið við uppskotinum er eisini at brynja føroyska vælferðarsamfelagið til tær avbjóðingar, ið longu eru og ikki minst standa fyri framman. Fólk liva longur, viðgerðarhættir gerast alsamt betri, og breið semja er um, at fólk ikki skulu vera á sjúkrahúsi í langa tíð, men skulu heldur hava tænastur í nærumhvørvinum so leingi sum gjørligt.

Hettar er eisini galdandi fyri borgarar yvir 67, og tað merkir ar borgarar yvri 67, verða útskrivaður til kommunar, áðrenn teir eru liðugur við endurvenjing, men hava ikki møguleika at fáa somu atgongd, sum borgarar undir 67, til hjálpartól. Júst atgongd til røttu hjálpartólini, er umráðandi fyri at endurvenjingin kann eydnast so væl sum gjørligt.

Ergoterapeutfelagið metu at Almannaráði eigur at tryggja, at ØLL eru líka fyri lógini, og heitur tí staðiliga á Almannaráði, tryggja at borgarar yvir 67, fáa somu sømdur og somu atgongd til hjálpartól, um borgarar undie 67.

§38 stk 3. viðlíkahaldsvenjing kann í mesta lagi játtast fyri 24 mánaðir í senn. Ergoterapeutfelagið mælir til at strikað hettar, tí, sum oftast, er tørvur á viðlíakhaldsvenjing ein varandi tørvur.

**<u>Aðrar viðmerkingar</u>**

Ergoterapeutfelagið vil mæla til, at peilinskipan til onnur enn borgararir við týðandi sálarligum virkistarnið, eisini var lógarfest. Borgarar (og teirra avvarðandi) við m.a. demens og seinheilaskaða hava stórar trupulleikar av, at tað ikki er lógarfest, at tað er loyvt at brúka peilingarskipan. T.d. fáa borgarar við seinheilaskaða eisini epilepsi. Í teimum flytføru epilepsiávaringinum er eisini ein peilingarskipan. Oftani sæst eisini,

at tá søkt verður um peilingarskipan til borgarar við demens, at tá er borgarin ikki klárir yvir hvat ein peilingarskipan er.

Ergoterapeutfelagið heitir tí á Almannaráðið, um at hesir málbólkar eisini verður fevndur í lógaruppskotinum. Tað kundi komi undir § 29 um hjálparráð.

Vegna Ergoterapeutfelagið

Vigdis Nolsøe, forkvinna

ergoterapeutfelagið

Vit fáa gerandisdagin at virka